## VIÐMERKINGAR

# Tilvit tankaskrímslsins

Ljóðini surra og her siti eg og eygleiði
tøgnina hvørva innundir míni eygnalok.

Fleiri og fleiri tankar sum fyrsta
tøgnin sloppin úr móðurlívi.

Vindeygu hjartans eru døkk
og kvarnarsteinurin hevur ikki mat í munnin.

Upphavi at øllum hesum liggur sum ein
kista full av gulli men eingin veit hvar
hon er goymd.

Og skipið sum listi var ikki saknað av nøkrum.
Hjarta sítt søkk sum hetta skip.
Og eg finni ikki tað einasta aftur sum eg eigi.

Hjarta er ikki altíð reint.
Skitið av gruggutum ólevnaði.

Tað er tað ið ikki kann sigast.
Og upphavið sum ljósið ikki fann
aftur í veruleikunum. Sum teir verða kallaðir.

Er ein orsøk til ilskuna sum
sinnið ikki er ment at bera.
Hví skuldi eg fáa hesar tablettir.
Hvat var orsøkin til tess.
Eg spyrji Gud. Og hann svarar mær aftur.
At Hann skal døma.

Havsins andadráttur biðjur um hjálp.
Hann dugir ikki at liva uttan ta bláu luftina.
Bláu luftina sum hjarta mítt andar samstundis
sum laggardropi ríka mansins tornar av helvitis
svávulgulu flammum.

Uppihaldið í tí fremmanda heiminum
sum ikki fær dropan frá mær tí at
eg eigi einans luft.

**Christian Fróði Djurhuus**

# Eg stuðli Jan Gardar



**Símun á Høvdanum**

Jan Gardar er ein ágrýtin maður. Hann hevur gjørt nógv fyri ungómin bæði innan ítrótt og metnan í Norðoyggjum og er tann seinasti, sum hevði dans fyri ungdómin í býnum. Hann er gamal svimjari, rógvari, judoleikari, fimleikari, hann er sjónleikari, hann hevur verið formaður í NFÍ, hann er dómari í fótbólti, hann hevur egið virkið og er deildarstjóri. Hetta sigur okkum, at hann kann stýra og at hann kann hjálpa ungdóminum, so hann kann trívast í býnum og vera verandi í býnum, nú undirsjóartunnilin verður veruleiki. Tí fær Jan Gardar mín stuðul og mína atkvøðu.

Min áheitan til Klaksvíksborgarar: Veljið Jan Gardar!!!

# Lógarreglur Tjóðveldisfloksins eru sum gummibond



**Rolf Guttesen**

Eitt løgin leikur er farið fram seinastu tíðina. Tjóðveldisflokkurin er vorðin eitt Cirkus-Hoydal. Tingmaðurin Torbjørn Jacobsen vil ikki finna seg í diktatum frá sitandi floksformanninum, og hevur brúkt nøkur lýsingarorð um formannin, sum onnur hava brúkt fyrr, bæði í talu og skrift. Eingin ivi er um, at tey eru røtt. Og nú ein floksfelagi (ella kanska fyrrverandi), sum kennir formannin sera væl, brúkar somu lýsingarorð, so er hetta bert ein undirstriking av tí, sum fólk flest hava hugsað í longri tíð. Høgni hevur problemir sum demokratiskur leiðari.

**Høgni er ein vatt-nissa**
Hevði Torbjørn gjørt nakað floksskaðiligt, so skuldi hann sjálvandi verið blakaður út. Men, sum ein drivin tjóðveldismaður, Finnbogi Ísakson, skrivaði so beinrakið í gjár, so hevdi Høgni ikki mansmót til at blaka Torbjørn út úr flokkinum. Nei, hann hevdi 'sjálvur' sett seg uttan fyri!!?. Hann verður ikki koyrdur út, men noyddur.

**Lógirnar eru einkisigandi**
Í lógum floksins stendur einki um hvussu ein limur kann ekskluderast, blakast út, um hann er óynsktur. So her eru fríar ræsur hjá einum ráðaríkum formanni. Har er heldur einki um appel-møguleika. Lógirnar eru stutt og gott óbrúkiligar. Einki um limarættindi, og vernd móti diktator-iskum tendensum.

**Krubban er tóm**
Greitt er, at torført var hjá Høgna Hoydal at missa positiónina sum landsstýrismaður við makt, sum tann ævigi gákarin í bløðunum um øll tey fiksu hugskotini, sum strax skuldu realiserast. Flaggstong í New York, limaskap í Nato, egið pass, piss og pappír. Nú er hann bert formaður í einum lítlum flokki í andstøðu. Krubban er tóm. Nú er tíð at sláast hvør við annan og geva hinum skyldina. Smáligt og avdúkandi.

# Tillykke den kristne verden!



**Mogens Tilsted Christensen**
*Sognepræst, Hvalvík*

Det blev den evangelisk-kristne George W. Bush, der blev genvalgt i USA. Det er så anden gang i nyere tid, USA genvælger en kristen præsident, der står ved sit kristne ståsted.

Den forrige var Ronald Reagan, som var eksponent for den fredelige afvikling af kommunismen i Sovjetunionen.

Følgende grunde kunne der være til, at Amerika har genvalgt George Bush:

1 Han er en mand med Guds karakter.
2 Han holder på nej tak til vielser af homoseksuelle
3 Han holder på nej tak til mord på de ufødte børn (abort)
4 Folk ved, hvor de har ham.
5 Han står ved sine beslutninger.
6 Han har humoristisk sans.
7 Han har siddet seks år som guvernør t Texas.
8 Han har 10 års erfaring i politik.
9 Han har en akademisk mastergrad fra Harvard.
10 Han er manden, som alle mænd kan lære noget af.
11 Han er en vedholdende evangelisk kristen.

Nu kunne man spørge, om det at være kristen skulle være noget særligt?

Ja selvfølgelig betyder det noget særligt. Alene tanken på, hvad alternativet er, burde få ethvert fornuftigt menneske til at omvende sig.

En milliard mennesker i verden hyller islam. Islams erklærede principper er at fjerne alle jøder og kristne. Kort sagt Islams erklæring af Hellig Krig over ethvert demokrati og alle andre religioner i verden er alternativet.

Det er jo ikke os kristne, der har erklæret Hellig Krig med trusler om ødelæggelse af alt anderledes tænkende.

Den kristne krig foregår i den åndelige verden √ uden våben.

Man må håbe, at det amerikanske genvalg af en kristen præsident for anden gang i nyere tid vil få den kristne frie verden til at vågne op.

Kristendom er et evangelium om Guds Søn, der opstod fra de døde. Og når den kraft, som opvakte Jesus fra de døde, kommer ind i mennesker,

Det var det, som skete for Bush, da han blev omvendt og gav sit liv til Jesus Kristus.

Sandhed er ilde hørt, men nu bliver den altså gentaget. Så enhver, der vil have andel i den evige sejr kan tage ved lære heraf og få andel i denne sejr.

Evangeliet er ikke kun bogstaver √ men det er KRAFT.

# Sjúrður og doktrinin



**Finnbogi Ísakson**

Páll Holm Johannesen hevði í hósdags-Sosialinum samrøðu við Sjúrð Skaale um ta ósemju, sum hevur verið í Tjóðveldisflokkinum. Har sigur hann um meg (sambært blaðmanninum):

*"Eg veit snøgt sagt ikki, hvat hann meinar við. Eg eri samdur við honum í, at talu- og skrivifræls skal ráða í flokkinum, men tað skal sjálvsagt vera undir ábyrgd. Tú kanst ongantíð verja teg við talu- og skrivifrælsi, at fólk spilla onnur út og baktala. Tað er vitleyst at verja lygnir og útspilling við talufrælsi. Eg eri vísur í, at varð Finnbogi Ísakson spiltur út upp á handan mátan, so hevði hann ikki vart seg við talufrælsi. Eg haldi snøgt sagt, at hatta er groteskt av Finnboga."*

Til hesi orðini hjá Sjúrði havi eg somu viðmerking, sum eg sendi einum, ið fanst at mær gjøgnum Internetið. Har svaraði eg millum annað:

*Hevði tú lisið mína viðmerking nóg væl, hevði tú verið varugur við, at hon byrjaði við, at eg leggi meg ikki út í stríðið teirra millum. Tað, sum eg vildi við greinini, var at vísa á, at Høgni fær meira og meira diktatoriskt vald í flokkinum, og at ta óhepnu - og ikki serliga dámligu - skrivingina hjá Torbjørn brúkar hann til at taka fastari um kvørkrarnar á flokkinum. Mær dámar ikki gongdina. Hon minnir ov nógv um gongdina í londum eystanfyri, har bara ein maður hevði alt vald.*

*Eg haldi tað bart út sagt vera forkastiligt, at Tjóðveldisflokkurin hevur samtykt, at tann, sum mutar ímóti formanninum, er automatiskt koyrdur úr tingbólkinum. Ein sjálvvirkandi ekskluderingsparagraf. Vildu teir hava Torbjørn út, so var at samtykkja tað. Men tað gjørdu teir ikki. Teir fóru sniðvegir, har teir lumpaðu hann at skriva undir sín egna deyðadóm.*

*Annars dámar mær ikki eksklusjónir yvirhøvur. Serliga ikki, tá tað, sum í hesum førinum, ikki var talan um politiskt mál. Tað snúði seg jú ikki um, at Torbjørn hevði svikið stevnuskrá floksins, men at hann hevði fornermað Høgna Hoydal. Um neyðugt átti Høgni at farið í rættin við einum injuriumáli. Tað hevði verið manslígari.*

Um tað, sum Sjurður sigur um, hvussu eg hevði reagerað í slíkari støðu, skal eg bara upplýsa, at antin hevði eg gjørt, sum skrivað stendur: Vend hin kjálkan til, ella hevði eg bara latið sum luft.



## VIÐMERKINGAR

# Suðuroy ein oyggj – eitt valdømi – ein heild

**Jaspur Vang**
*Valevni Sambandsfloksins á Tvøroyri*



Oyggj okkara er eitt valdømi, har øll oyggjin landspolitiskt átti at drigið somu línu, men so er tíverri ikki. Nógv bendir á, at kommunuskipanin í oynni, sjálvsøknir politikarar og vanabundin hugburður eru partvísar orsøkir til, at so er.

Tað er eingin loyna, at tað millum báðar býirnar í oynni, sum fólkatalsliga eru javnt stórir, hevur verið ávís kapping. Líknandi kapping hava vit eisini sað millum eitt nú báðar teir størstu býirnar í landinum, nevnilig Tórhavn og Klaksvík. Sostatt er ikki talan um nakað serfyribrigdi í Suðuroy, ella nakað, sum sermerkir fólkið, sum her býr.

Avleiðingar av omanfyri nevndu kapping millum býir, hevur tó havt ógvuliga ymiskar avleiðingar.

Hvat Tórshavn og Klaksvík, sum liggja í hvør sínum valdømi, viðvíkur, hevur kappingin millum bæði plássinum elvt til samanhald, styrki og harvið menning í hvørjum valdøminum sær. Tað er so at siga ókent, at kommunal- og landspolitikarar í eitt nú norðoyggjum hava keglast alment í fjølmiðlunum, tá talan hevur verið um at vinna valdøminum eitt nú landspolitiskar sømdir. Heldur enn at profilera sín egna persón í fjølmiðlunum, hava politikararnir tvørtur um flokkspolitisk mørk og tvørtur um kommunumørk funnið felags stev, øllum valdøminum til frama.

Hvat teimum báðum størru býunum í Suðuroy viðvíkur, er støðan heilt øðrvísi. Kappingin millum báðar býirnar her suðuri, hevur havt við sær, at einstakir politikarar áhaldandi royna at tekkjast tí partinum av oynni, har teir meta seg fáa størsta persónliga politiska vinningin. Hettar hevur verið við til at birta upp undir gamalt kegl og stríð, eins og ávísir kommunalpolitikarar hava gjørt sær dælt av tvídráttinum millum báðar býirnar og latast verja borg, men sáa harvið sundurlyndi, heldur enn at søkja samstarv, samanhald og semju. Soleiðis hevur valdømið so at siga verið tvídeilt, heldur enn at vit hava staðið saman mótvegis eitt nú landspolitiska myndugleikanum. Suðuroy sum heild hevur verið stórið taparin.

**Semjusøkjandi loysnir.**
Hyggja vit nøkur ár aftur í tíðina, vórðu eitt nú Felagsskúlin á Oyrarbakka og Sandoyar Meginskúli bygdir miðskeiðis í tí øki, teir vóru ætlaðir. Felags fyri hesar loysnir var m.a., at tær fyribyrgdu politiskum kegli og stríði millum bygdirnar í økjunum.

**Miðnámsskúlin í Suðuroy.**
Við løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 varð m.a. heimilað landsstýrinum at byggja Miðnámsskúla í Hovi. Samstundis varð heimilað landsstýrinum at byggja næmingaheim í tilknýti til skúlan. Uttan iva var her talan um eina skilagóða semjusøkjandi loysn, sum kundi verið við til at savna oynna um ein skúla- og mentunardepil.

Síðani rakti landsumfatandi búskaparkreppan land okkara og varð hettar væl ein høvuðsorsøkin til, at byggingin av Miðnámsskúla í Hovi dró út.

Sum fyribils loysn varð bygningur í Vági innrættaður til Miðnámsskúla.

Við viðtøkuni av løgtingslóg nr. 49 frá 3. apríl 2001 gjørdi undanfarna samgonga tað dáragerð at flyta Miðnámsskúlan til Vágs. Ein og hvør dugir at síggja, at hendan lóg var við til seta kílar millum økini í oynni. Hvørt talan var um persóns - og/ella flokkspolitiska profilering kunnu vit hvør sær gera okkum okkara tankar um. Vit kunnu tó ásanna, at henda stuttskygda og óhepna avgerð, enn einaferð hevur elvt til klandur og sundurlyndi í oynni.

Tá Miðnámsskúlin varð fluttur úr Hovi til Vágs, vórðu hvørki bygdaráðið í Hov ella aðrar kommunur í oynni tiknir við uppá ráð.

Hví søguliga plássið og náttúruvakra økið við Hov ikki var hóskandi at byggja Miðnámsskúla, man verða mongum ein gáta.

**Suðuroy ein heild.**
Nú umboð fyri landsstýrið fyri stuttum borðreiddu við einari umfatandi almennari íløgu í oynni, sum í sjálvum sær hevði verið arbeiðsskapandi, og harumframt hevði havt við sær mong og lutfallsliga vællønt og trygg størv, er tað undrunarvert, at málið - í vónandi fyrstu atløgu - fekk ein so bráðan enda.

Í og við at Suðuroy er ein arbeiðsmarknaður, eitt eldraøki og eitt skúlaøki, átti landspolitiski myndugleikin sum skjótast at lagt málið fyri allar kommunurnar í oynni til felags støðutakan. Hettar út frá tí grundsjónarmiði, at skulu vit koma sundurlyndinum til lívs og finna skilagóðar loysnir, er neyðugt at viðgera oynna sum eina heild.

Við atliti til stóru kommunuskuldina í oynni og kreppulíknandi eyðkennini, sum aftur nú síggjast í oynni og ásannandi tann veruleika, at eldraøki er ein landsuppgáva, eigur landspolitiski myndugleikin harumframt at fíggja íløguna í ellis- og røktarheimið, sum ætlanin er at byggja.

Í og við at tað er munandi bíligari at byggja og reka ein skúladepil við Miðnámsskúla og Almanna- og Heilsuskúla, heldur enn at byggja og reka tveir skúlar, talar alt fyri, at skilabesta loysnin er at byggja skúladepilin í Hovi, sum upprunaliga ætlað. Ein skúladepil og harvið ein savnandi mentunardepil miðskeiðis í oynni, hevði harumframt verið við til at samansjóða oynna.

Tað áliggur nú kommunustýrunum í oynni at leita saman í einari roynd at finna felags stev um bygg-ingina av ellis- og røktarheimi og skúledepli. Slíkt samstarv átti fyri langari tíð síðani at veri komið í lag.

Var Suðuroy ein kommuna, man lítil ivi vera um, at tað hevði verið munandi lættari at staði saman um eina skilagóða loysn á m.a. málunum um Skúladepil og bygging av ellis og røktarheimi í oynni.

Til kommunustýrisvalið 9. novembur er tað tí umráðandi at velja menn og kvinnur, sum hava evnini og viljan at søkja semju og samstarv, framtíðini og oyggj okkara til frama.

# Kommunuvalið 2004

**Asbjørn Mikkelsen**
*valevni til Runavíkar kommunu*



Nú stundar til kommunuval og maður og kvinna skulu av húsi at velja.

Soleiðis er eisini í nýggju stórkommununi í Eysturoynni.

Sigast má, at vit eru í eini broytingartíð - nú, ið Skála - , Oyndarfjarðar - og Elduvíkar kommuna leggja saman við Runavíkar kommunu.

Sjálvur havi eg sitið í bygdaráðnum hjá Skála kommunu hetta farna skeiðið. Skeiðið hevur verið spennandi. Samstarvið hevur verið sera gott og hevur givið gróðrarlíkindi til vøkstur á so mongum økjum.

Á breddanum hevur staðið trivnaður, sum m.a. er:
- útvegan av grundøkjum til familjur, ið vilja seta búgv
- barnaansingarpláss
- møguleikar fyri frítíðarítrivi av ymiskum slag
- eldraøki
- fríðkan av skúlaøki og øðrum
- góðar rammur til vinnulív og felagslív

Eisini hava vit, - eins og bygdafólk okkara - lagt dent at hava gott samstarv við grannabygdir okkara, har vit m.a. kunnu nevna samstarv innan eldsløkkilið, røktarheim, ítrótt, v.m.

Fleiri nýggj hús eru bygd hetta seinasta skeiðið. Fólkatalið í kommununi er soleiðis økt við umleið 70 innan fyri 4 ár.

Á Skála og í Skálafirði hava vit eina vælvirkandi dagrøktarskipan - uttan bíðirøð - , sum harumframt hevur eina spælistovu at ráða yvir. Frá hesum skúlaárinum hava vit eisini sett á stovn ein frítíðarskúla. Á tekniborðinum liggur barnagarður.

Á eldraøkinum hava vit bygt víðari á lagdar lunnar hjá undanfarna bygdaráði og eru nú við at víðka eldrabýlið við plássum til 8 búfólk aftrat, samstundis sum arbeiðsfólkið fær betri umsitingarhølir.

Stadion-økið er og verður dagført, - bæði høll, vøllur og økið uttanum, - so hesi lúka tey krøv, ið verða sett slíkum økjum framyvir.

Skúlin, ið varð bygdur í 1990, og økið kring hann, er eisini dagført, í tøttum og góðum samstarvi við lærarar og skúlastýri.

Avtalað er gjørd við hagapartarnar um vetrarfriðing, sum eftir ætlan verður verksett komandi árini. Hetta fer at geva kommunalu umsitingini, eins væl og borgarunum, góðar karmar til at skapa og viðlíkahalda grøn økir.

Framburður er tengdur at, at fíggjarviðurskiftini eru í lagi, og tað má sigast, at so er, tí saman við øllum hesum sjónliga framburði hevur kommunan samstundis niðurgoldið skuld, soleiðis at henda nú verður umleið 1,6 álíkning við ársskiftið móti 2,5 álíkning við byrjan av hesum skjótt farna 4 ára skeiði.

Nú leggja vit so - eftir bygdaráðsins og fólksins vilja - saman við oman fyri nevndu kommunum, og stóra kommunan fer at bera navnið Runavíkar kommuna. Hetta, at leggja saman, er í sær sjálvum ein spennandi avbjóðing, sum eisini setir nýggj og øðrvísi krøv til teirra, ið inn koma.

Vóni, at hetta samstarv kann bera frukt og verða til gagns fyri allar borgarar kommununnar.

Málið má vera, at tað skal verða gott at vera borgari í samanløgdu kommununi.

Takki fyri tíðina, ið eg fekk innan bygdaráðsins gátt á Skála. Eri sinnaður at gera mítt til, at virkast kann víðari í stóru kommununi í góðum samstarvsanda.

Men um eg fái høvi til tess, tað er í fyrstu syftu upp til veljarans at avgera.

Gott val !

Tað í sær sjálvum er ein spennandi avbjóðing, eg havi tikið.

# Positiv hugsan gevur positivt úrslit

**Vagnur Johannesen**
*Signabøur*



Um fáar tímar skal veljarin a6vgera, hvør kemur at stjórna kommununi næstu fýra árini.

Sera umráðandi er at velja umboð til býráðið, sum arbeiða fyri allar borgarar í einum positivum anda, tí tær negativu kreftirnar kunnu bert tøla allan framburð.

Nógv er gjørt í okkara kommunu hesa brátt farnu setuna. Ikki tí, okkurt kundi sjálvandi verið gjørt øðrvísi, men tann, sum ongan feil ger, hevur onki gjørt.

Útgangsstøðið fyri at vit øll skulu hava tað gott er at arbeiði er til allar hendur, og tí er umráðandi at vinnan framhaldandi skal hava bestu møguleikar at virka undir, soleiðis at vit øll kunnu fáa aktivera meira av okkara dreymum.

Tað eigur altíð at verða arbeitt víðari á herðunum hjá teim undanfarnu, og um okkurt skal broytast, so skal tað gerast í einum positivum anda til frama fyri kommunu og borgarar.

Tað er sera umráðandi, at kommunan veksur eftir skilagóðum framtíðarætlanum, sum verða gjørdar í tøttum samstarvi við ognarar og avvarðandi myndugleikar.